# 7-8000 fólk hugdu at Ronju



Tá tær 21 sýningarnar av Ronju Ránsmannadóttir vóru av í vikuskiftinum, høvdu eini 7-8000 fólk sæð leikin, hetta sigur væl nøgdi stjórin í Norðurlandahúsinum, Niels Halm.

Hetta var eitt øgiliga stórt tiltak, við risa pallmyndaarbeiði, nógvum fólki, ið skuldi virka saman, og tað gjørdist ein sonn success, sigur Niels Halm, um leikin Ronju Ránsmanandóttir, ið eini 7-8000 fólk hava sæð tær 21 sýningarnar.

Eisini Jenny Petersen leiðari av Tjóðpalli Føroya er sera væl nøgd við leikin. Hon sigur, at hon slettis ikki hevur hugsað um áskoðaratøl, men heldur hugsa um hvussu tað gekk á pallinum og handan pallin.

Hon sigur at avviklingin gekk ordiliga væl. Stemningurin var góður, og tað var stuttligt at vera partur av hesum.

Tey fylgdu tí leisti, sum var lagdur fyri verkætlanina, við at sameina yrkisleik við áhugaleik og so samstarva við mussikskúlan. Við vilja fingu áhugaleikarar teir størru leiklutirnar, meðan yrkisleikararnir virkaðu meira, sum stuðlar og høvdu ymiskar venjingar við áhugaleikarunum.

Jenny sigur, at yrkisleikararnir eru øgiliga glaðir um tilakið, Tey hava bæði hugnað sær og lært nógv.

Jenny sigur seg serliga vera væl nøgda við, at samanhaldið gjørdist so gott millum øll, sum luttóku. Nógv av fólkinum kendist ikki, tá tey fóru í holt við leikin. Men tey gjørdust skjótt ein eind, og man merkti einki til klikir og annað tílíkt.

Tá sjúka beint uppundir frumsýningina var um at noyða tey til at útseta hana, tá kempaðu øll saman, og áhugaleikararnir vóru fyrimyndarligir, í sínum arbeiði at fáa alt at rigga, og tað riggaði. Hetta hevði ikki borið til uttan tað góða samanhaldið, sigur Jenny. Hon er sjálvandi eisini glað fyri at so nógv fólk hevur sæð leikin, og sigur at allar tær positivu afturmeldingarnar hava verið stuttligar.


























